## VIÐMERKINGAR

# Søkja ikki



GUNVÁ VIÐ KELDU
Limur í Sosialu Nevnd Klaksvíkar Býráðs

**Klaksvíkar Býráð hevur seinastu árini arbeitt við undangonguverkætlan innan eldraøkið, har landsstýrið so gott sum ikki hevur verið við**

Tað kann tykjast løgið fyri klaksvíkingar og norðoyingar at hoyra í fjølmiðlunum, at Klaksvíkar Kommuna ikki sendir umsókn við umbøn um stuðul til røktarheimsbygging.

Føroya Lansstýri hevur fulla ábyrgd av eldraøkinum!

19. des. 2005, samtykti Føroya Løgting eina lóg, fyri at fáa nøkur røktarheimspláss til vega í skundi, har kommununar fáa ein møguleika at søkja um stuðul til bygging av røktarheimi. Stuðulin sum verður veittur, er helvtin av útreiðslunum av hvørjum búplássi, tó í mesta lagi kr. 500.000 fyri fólki. Longu 31. januar 2006 er umsóknarfreistin úti. Saman við umsóknini skulu vera, tekningar, kostnaðarmeting og staðseting av heiminum. Treytin er at byrjað verður beinanvegin og røktarheimi skal standa liðugt í 2008. Tó í ávísum føri kann gevast undantak at fara inn í 2009 áðrenn liðugt verður.

Haldi at her skuldu allar kommununar havt melda út beinanvegin, at hetta finna vit okkum ikki í. At geva ein freist uppá góðan mánaða, uppá eina verkætlan sum í okkara føri fer at kosta uml. 30-40 mió krónur, er beinleiðis ábyrgdarleyst.

Fíggjarætlanirnar hjá kommunum skuldu vera inni hjá landsstýrinum 3. des. 2005 tvs. har hevur ongin kommuna havt møguleika at seta pening av fyri 2006, í øllum førum um tær ikki hava havt hetta við í ætlanunum.

Eisini inniber lógin, at tær kommunur sum ikki søkja nú, ikki kunnu søkja aftur fyrr enn 2009. Tvs. Klaksvíkar Kommuna sum hevur røktarheim á langtíðarfíggjaætlanini og pening settan av í 2008, ongan møguleika hevur at søkja í 2007.

**Fund við landsstýrismannin**

Tað er ikki meir enn 2 ár síðani vit í Klaksvík tóku í nýtslu sambýli og eldraíbúðir sum var ein undangonguverkætlan har landsstýrið so gott sum onki hevur hjálpt til fíggjarliga. Tí kann tað ikki vera rætt at landsstýrismaðurin fer út í fjølmiðlarnar og nevnir Klaksvíkar Kommunu, tá hann veit at vit hava nøkta 73% av tørvinum av røktarheimsplássum, har nógvar av kommunum liggja langt niðanfyri.

Klaksvíkar Býráð samtykti á býráðsfundi hóskvøldið 26. januar at biðja um fund við lansstýrismannin í Almannamálum um samlaðu støðuna á eldraøkinum í Norðoyggjum og hvussu økið best kann verða skipað. Vónandi spyrst nakað jaligt burturúr hesum fundi, eftir hesa køldu spann av vatni kommunurnar hava fingið omanyvir seg frá landsstýrinum.

# Panikkur í Fólkaflokkinum



HØGNI HOYDAL
Formaður Tjóðveldisfloksins

**Alt, sum er sagt higartil frá samgonguni um uttanríkisheimildir og ST-fráboðanir, er vorðið avdúkað sum bluff og uttanumtos. Eg tori at leggja høvdið á blokkin og siga, at henda seinasta útmeldingin frá Fólkaflokkinum, har teir vísa løgmanni misálit, fer skjótt at verða avdúkað sum sami sjónleikur**

Tað var roknandi við, at Fólkaflokkurin fór at royna onkra panikkloysn, nú tað má standa øllum greitt, at samgongan hevur hildið øll fyri gjøldur í sjálvstýrismálum. Men tað gerst alt meira pínligt at eygleiða henda glantrileikin, har ongin kann skilja nakað av tí, sum gongur fyri seg.

Nú sigur Anfinn Kallsberg seg hava fingið lyfti um frá donsku stjórnini, at nakrar føroyskar viðmerkingar til eina danska lóg skulu sendast ST.

Tað er í fyrsta lagi eitt dygt misálit á løgmann, sum á nýggjárinum traðkaði fram fyri Føroya fólk og kunngjørdi, at nú var okkurt fantastiskt hent við eini danskari fráboðan, ið varð send ST. Tað sama segði Anfinn Kallsberg.

Men eftir at Tjóðveldisflokkurin hevði víst á sína støðu og lagt uppskot fyri Løgtingið um at mótmæla hesum, byrjaði panikkur at koma í. Løgmaður vísti fyrst øllum frá sær, men nú varð knappliga vent í holuni hjá Fólkaflokkinum. Nú er tað knappliga um at gera, at fáa nakrar føroyskar viðmerkingar til hesa donsku lógina til ST. Og Anfinn Kallsberg sigur seg nú hava orðnað tað, sum Løgmaður ikki megnaði.

Men hevur nakar kannað, hvat liggur í hesum? Hevur nakar spurt danska uttanríkisráðharran, hvat hann skal hava lovað Anfinni? Og hevur nakar kannað, hvat liggur í hesum sonevndu føroysku viðmerkingunum?

Fyri Tjóðveldisflokkin er tað greitt, at alt sum higartil er sagt frá samgonguni, er bluff og uttanumtos. Onki av tí, sum higartil er sagt um hetta málið, hevur víst seg at passa. Alt snýr seg eftir øllum at døma um at fáa fullveldismálið av dagsskránni og at rura fólk í svøvn. Eg tori at leggja høvdið á blokkin og siga, at tað fer ikki at ganga long tíð, áðrenn tað kemur fram, at sonevnda lyftið hjá Anfinni frá donsku stjórnini eisini er bluff.

Hetta málið snýr seg hvørki um nakrar føroyskar viðmerkingar til eina danska lóg ella nakrar aðrar smálutir. Hetta málið snýr seg um, at samgongan hevur samtykt eina danska og eina føroyska lóg, sum staðfestir, at føroyingar hava ongar heimildir í uttanríkismálum, men bert kunnu vera fulltrúar hjá Danmark sum “Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne”.

Tjóðveldisflokkurin atkvøddi ímóti bæði teirri donsku og teirri føroysku lógini. Hetta við teimum føroysku viðmerkingunum, var bert ein roynd hjá samgonguni at flyta fokusið frá málinum.

Uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum, sum liggur á tingi nú, snýr seg ikki um at senda nakrar føroyskar viðmerkingar til ST. Tað snýr seg um at fráboða, at Føroya fólk hevur ongantíð tikið undir við at lata allar heimildir frá sær til eitt annað land.

Tað mest løgna er at eygleiða panikkin og royndirnar at rógva afturáaftur hjá Fólkaflokkinum. Tjóðveldisflokkurin hevur aftur og aftur víst á, hvat gekk fyri seg í hesum málinum, og staðiliga mælt til at koma aftur á beint.

Eg kann til upplýsingar endurgeva ta almennu áheitan, sum Tjóðveldisflokkurin sendi til løgmann í august mánaða 2005 – altso fyri einum hálvum ári síðani. Hon ljóðaði soleiðis:

**Vælsignaður løgmaður, frem ikki eina óbótagerð!**

*Útvarpið visti í dag at siga (í august 2005), at løgmaður ætlaði at fáa donsku stjórnina at fráboða uttanríkispolitisku heimildarlógina til ST*

*Vónandi er talan um eina misskiljing ella eina óumhugsaða útsøgn frá løgmanni. Um løgmaður biður donsku stjórnina fráboða ST, at vit ikki hava nakran altjóða rætt, men bert kunnu gera altjóða sáttmálar vegna Danmark sum „Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne“ – og bert um danir góðtaka tað og tað ikki stríðir móti donskum áhugamálum – so er talan um eitt uppaftur álvarsligari og vandamiklari afturstig, enn tá løgtingið samtykti hesar donsku lógirnar.*

*Eitt er, at Løgtingið – helst í stórum ósketni – hevur samtykt eina danska lóggávu, sum letur allar heimildir og allan rætt til danskar myndugleikar at avgera. Tað er jú vorðið væl og virðiliga staðfest, at ávaringar frá andstøðuni og frá serfrøðingum vístu seg at vera rættar. Eitt annað er, um løgmaður uttan nakra fólkaatkvøðu ella demokratiska viðgerð ætlar at lata donsku stjórnina boða ST og altjóða samfelagnum frá, at vit eru gingin undir hesar treytir. Tá er okkara fólkarættarliga støða beinleiðis undirgrivin mótvegis altjóða stovnum.*

*Tað sama er at siga um sonevndu yvirlýsingina, har sjálvsavgerðarrætturin er nevndur. Undir viðgerðini av málinum og uppá beinleiðis fyrispurningar, hevur danska stjórnin jú gjørt greitt, at talan er bert um ein ”innara sjálvsavgerðarrætt” – altso inni í danska ríkinum.*

*Um hetta verður fráboðað ST, so hevur danska stjórnin fingið bæði í posa og sekk. Posan fekk hon, tá løgtingið samtykti ómegdarlógirnar. Sekkin og kjaftibandið fær hon, um vit góðtaka, at ST fær boð um, at vit bert eru ein landslutur undir donskum rætti.*

*Eitt slíkt stig hevði verið at farið longur á sambandsleið, enn sjálvt teir eldru sambandsmenninir í føroyskum politikki nakrantíð hava góðtikið. Tí vil eg staðiliga ávara ímóti einum slíkum afturstigi. Og eg vil inniliga heita á løgmann um ikki at fremja nakra óbótagerð. Í minsta lagi rokni eg við, at løgmaður leggur hetta fyri løgtingið, áðrenn hann gevur donsku stjórnini honds- og hálsrætt yvir føroyskum sjálvræði.*

# Sannleikin er oftani illani lýddur

JAKOB HOLM
Argir

**– Tórbjørn Jacobsen, sum altíð er skjótur at leggja eftir øðrum, átti at tolt meira mótgang – og hann átti fyri langari tíð síðani at havt lagt frá sær sum politikari við øllum gølunum, hann hevur skapt, heldur Jakob Holm**

Nú klári eg ikki at halda mær longur.

Tað er við at blíva ein vani, tá man lesur bløðini, at Tórbjørn Jacobseb, goyr og geylar upp um fjant og fjas.

Vit vita øll, at tað vóru nógv sum fóru húsagang í 80 til 90-unum, so tað er ikki nakað nýtt, at tað vóru fólk, sum ikki fingu endarnar at hanga saman.

Men tað vóru eisini tey fólk, sum søgdu seg ikki fáa endarnar at røkka saman við øðrum spekulatiónum í tonkunum, fyri at skora kassan.

Tað var so lætt at bara koyra alt konkurs, (ella fáa sanaring) fyri síðan at keypa tað aftur fyri lítlan og ongan penga, og so liva sum greivar av at fara konkurs, soleiðis er tað eisini ídag (hví tað)?

So eg dugi ikki at skilja T.J. at tú skalt leika so í, nú tað er onkur sum er maður fyri at koma fram við sannleikanum um, hvussu alt for fram her á landi í 80 til 90-unum.

So T.J., hatta lesarabrævið sum var til tín í Sosialinum tann 20. januar, og sum var skrivað av ein persóni, sum tit siga, skal vera anonymur og ikki hevur sagt sítt rætta navn, er sjálvandi ikki rætt at gera, men tað kundi verið, at tað er ein persónur, sum kennir for nógv til tín (tykkum) og sum ikki vil vera hongdur út av tær, tí tað vísir seg, at tú kann gera og siga akkurát tað sum passar tær, uttøan at vera revsaður fyri nakað.

Men tað er nokk tí, at her á landi eru nógvar vattnissur í høgum stillingum.

Tað sum dulnevndi skrivaði í Sosialinum tann 20. januar er nú heldur ikki lygn T. J.

Tað sum er galið her á landi, tað er, at nógv hava tagnarskyldu, og sum virkuliga vita nakað, sum burdi verið komið fram fyri Føroyar fólki.

Men til tín T.J. so havi eg eisini siglt fyri KGH í Grønlandi um somu tíð sum tú. Havi eisini siglt fyri Copenhagen Reefers, so tú skalt ikki vera yvirraskaður at tað eru onnur sum kenna til slíkt, sum nú er komið fram í lesarabrævi undir dulnavni S.H.J. av Tvøroyri tann 20. januar 2006

Tað sum hann skuldi gjørt, tað var at koma fram við meira um trolarin hjá tær.

Nej T. J. tú ert so skjótur at rópa upp og fara eftir persónum, so tú skuldi tolt meira mótgang móti tær sjálvan, tú sum aldrin heldur kj...... Serligani tá tað eru persónar, sum ikki dansa eftir tínari pípu.

Er tað nakar sum sigur tær ímoti, so uppførir tú teg sum ein smádrong sum hevur fingið tikið slikkipinnin úr munninum.

Eg meini, at tú skuldi feia fyri egnu dyr, næstu ferð tú goyr og gall úr tær yvir aðrar pers. Við slíkum tvassi.

Tað er ikki skomm skapt í tær T.J. tí um so var, ja so hevði tú lagt frá tær sum politikkari fyri langari tíð síðan, ella gingið stillisliga við hurðunum, við øllum teimum gølunum tú hevur gjørt.

Gud bevare Føroyar og Danmark.

